# AGA- & ETISKANEVNDIN

**KÆRA 3/2024**

| *FSF-skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: FC Hoyvík kærir Víking fyri brúk av ólógligum leikara, sum er skrásettur í øðrum felag, U21 dreingir** | |
| Deild: U21 Dreingir, Bólkur B | Hvør hevur reist málið: FC Hoyvík |
| Kapping: Landskapping | Nevndin móttikið kæru: 28.6.2024 |
| Møguligt brot framt: 17.6.2024 | Kærugjald goldið: Ja |
| Partshoyring: Ja | 5 daga kærufreist hildin: Ja |
| Áheitan um munnliga viðgerð: Nei | FSF-ummæli: Ja |

## Úrskurður

Staðfest er, at Víkingur U21 dreingir høvdu ein leikara á sínum liði í dysti móti FC Hoyvík leiktur 17. juni 2024, sum er skrásettur sum leikari hjá ÍF. Talan er um leikaran Aron Kenson, føddur 8. januar 2004. Leikarin leikti undir navninum á øðrum leikara hjá Víkingi.

Mong fordømi eru um, at felag verður dømt at tapa dyst fyri brúk av ólógligum leikara. Mong fordømi eru eisini um, at felag fær bót fyri at svika við nøvnum á dómaraseðilinum. Eitt fordømi er um, at persónlig revsing við leikbanni verður ásett til leikara, sum hevur leikað undir følskum navni, sí kæru 1/2024. Herðingin er gjørd við tí í hyggju, at persónliga revsingin skal fáa ein fyribyrgjandi virknað, so leikarar aftra seg við at fremja slík lógarbrot.

Víkingur verður dømt at tapa dystin móti FC Hoyvík leiktur 17. juni 2024 við málmuninum 0-3 fyri brúk av einum leikara, sum er skrásettur hjá øðrum felagið. Fyri tilvitað svik við einum navni á dómaraseðilingum fær Víkingur eisini 2.000,- kr. í bót. Harumframt verður ÍF-leikarin Aron Kenson, leikbannaður tann ella teir dystir, sum viðkomandi lógliga kann leika næsta leikumfar.

Tapið við málmuninum 0-3 er ásett við heimild í § 6, bókstav g í 3. reglubroti í aga- og etisku reglugerðini og samsvarandi grein 41 í Kappingarreglunum fyri fótbólt. Bótin til Víking er ásett við heimild í grein 6, bókstav c í 1. reglubroti í aga- og etisku reglugerðini og leikbannið til ÍF-leikaran er ásett við heimild í grein 6, bókstav c í 2. reglubroti í aga- og etisku reglugerðini.

Einans úrskurðurin um, at Víkingur er dømt at tapa dystin, kann kærast til Yvirkærunevndina. Freistin at kæra er 5 dagar.

## Kæran, partshoyringin og møguligt Starvsnevndarummæli

FC Hoyvík kærir Víking fyri brúk av ólógligum leikara við tað at ein navnnevndur leikari, sum er skrásettur hjá ÍF, leikti við Víkingi undir navninum á einum Víkinga-leikara.

Víkingur hevur í partshoyringini ikki afturvíst lógarbrotinum.

## Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið

Vísandi til grein 2, 3 og 5 í aga- og etisku reglugerðini hjá FSF, hevur Aganevndin málsføri at viðgera hetta mál.

## Fakta í málinum

Skrivstovan hjá FSF hevur upplýst málið og eftirkannað skrásetingarnar um nevnda leikara. Staðfest er, at kæran snýr seg um brúk av leikara, sum er skrásettur í øðrum felag.

# AGA- & ETISKANEVNDIN

| **Lógarverkið** |
|---|
| Sambært grein 6 í Kappingarreglunum fyri yngri deildir, skal COMET skipanin brúkast í staðin fyri dómarakort og leikaraváttan og leikaralistin skal verða gjørdur í COMET skipanini, áðrenn dystur verður leiktur.<br><br>Sambært grein 15 í Kappingarreglunum, skal leikari tilmeldast leikaraskráseting FSF's og er leikarin at meta sum lógligur leikari fyri tað felagið, leikarin er skrásettur hjá.<br><br>Sambært grein 28 í Kappingarreglunum, skulu allir leikarar skrásetast á dómaraseðilin. |
| **Staðfestingar, metingar og niðurstøða** |
| Aga- og etiskanevndin staðfestir, at Víkingur brúkti ein ÍF-leikara, sum leikti undir følskum navni á dómaraseðilinum í dystinum móti FC Hoyvík.<br><br>Aga- og etiskanevndin metir, at tað hevur stóran týdning, at feløgini virða dómaraseðilin og tann týdning, hann hevur sum amboð fyri gjøgnumskygni og eftirlit. Aga- og etiskanevndin metir eisini, at svik við nøvnum á dómaraseðilinum er álvarsamt brot, sum hóttir ítróttarliga integritetin í kappingum fyriskipaðar av FSF. Fleiri fordømi eru um, at felag er álagt bót fyri svik og fusk við nøvnum á dómaraseðilinum.<br><br>Aga- og etiskanevndin metir harumframt, at leikarar skulu revsast persónliga fyri at hava leikt dyst undir følskum navni, óansæð um leikarin hevur leikt ólógliga fyri egið felag ella annað felag. Á henda hátt, merkir ólógligi leikarin sviðan av lógarbrotinum, sum viðkomandi er samsekur í. |
| **Kæruvegleiðing** |
| Sambært grein 10, litra f í aga- og etisku reglugerðini, kann úrskurðurin um at Víkingur tapir dystin, kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar eftir, at úrskurðurin er móttikin. |
| **Staður, dagfesting og undirskrift:**<br><br>**Tórshavn 3. juli 2024**<br>Anni á Hædd<br>Anni á Hædd<br>forkvinna |
| Í Aga- og etiskunevndini eru: Anni á Hædd, forkvinna og løgfrøðingur, Eli Thorsteinsson, næstformaður og løgfrøðingur, Ken Nónklett, løgfrøðingur, Jóhan T. Davidsen, løgfrøðingur og Sissal Kj. Kristiansen, sniðgevi og ráðgevi. |